# FAKTORHÚSIÐ

Hugskotskapping

22. MAI 2018

RÓKUR TUMMASARSON /
tummasarson@gmail.com

## Søguligt bakstøði

Faktorhúsið, sum eg velji at kalla húsið í hesum skjali, er ikki einans elsta sethús á Tvøroyri, men eftir øllum at døma elsta hús á Tvøroyri í heila tikið. Tí húsið er bygt 1836, meðan krambúðin stóð liðug í 1837.

Húsið var bygt av kongaliga einahandlinum til bústað hjá teimum, sum stavaðust í krambúðini, ið var úthandil hjá einahandlinum í Suðuroy fram til 1856, tá T.F.Thomsen keypti ognirnar.

Kring húsið var frá byrjan av innløgd trøð til húsarhaldið hjá handilsfólkunum. Hon er sjálvandi minkað við tíðini, men liggur tó enn sum eitt grønt andarhol í gamla miðbýnum.

Uttanfyri trøðna lá Tvøráin opin, og var har gjørdur vøllgarður, ið skuldi verja húsið móti ánni, tá hon leyp um vetrarnar.



*Ida, Hans Georg og børn.*

Upprunaliga hevði húsið tvær lonir við einum smalum skoti ímillum. Í vestaru lonini búði faktorin, ið var heitið á honum, ið stýrdi handlinum, og í uttari lonini búðu ein ella tveir krambakallar. Í uttaru lonini var eisini roykstovan og hildið verður, at tað er orsakað av hesum, at heitið Faktorhúsið er vikið fyri heitinum Roykstovan, sjálvt um henda lonin var tikin niður eftir eina ódn í 1930unum.

Tá einahandlin var avtikin í 1856, búðu faktorin og krambakallar hjá Thomsen í húsinum. Í 1871 fór seinasti faktorin hjá Thomsen frá, og elstu synirnir hjá T.F.Thomsen skiftust um at vera summar og vetur á Tvøroyri. Mest var tað tó elsti sonurin Hans G. Thomsen, sum búði á Tvøroyri.

Í 1883 búsettust Hans Georg og konan Ida fast í húsunum. Í 1898 fluttu tey í nýbygd og størri hús. Eftir hetta var Faktorhúsið nýtt til arbeiðsfólk og fiskagentur hjá Thomsen. Undir krígnum var Fisk&Kips matstova har, og seinni var vestari endi av húsunum hækkaður, og Gunnar Thomsen við familju flutti inn. Og at enda búði Thomas F. Thomsen, oldurabbasonur fyrsta Thomsen í húsunum.

Umframt Faktorhúsið á Tvøroyri, eru faktorhús í Klaksvík og Vestmanna, ið vóru knýtt at úthandlinum hjá kongaliga einahandlinum har.  Somuleiðis eru fleiri faktorhús í Íslandi.

# Hugskot

Mítt hugskot um, hvat Faktorhúsið kann nýtast til tekur støði í, hvat eg sum títtur vitjandi á staðnum meti, at Tvøroyri vantar.

Hugskotið er býtt í tríggjar partar:

- Útsjónd á húsinum
- Virksemið í húsinum
- Trøðin um húsini

Eg eri hvørki arkitekt ella grafikari, so fari ikki at gera nakra roynd at tekna, men einans lýsa mítt hugskot í orðum og myndum.

## ÚTSJÓNDIN Á HÚSINUM

Hyggur ein at gomlum myndum, so er skjótt at staðfesta, at Faktorhúsið hevur broytt útsjónd við tíðini.

Útbygningurin vestureftir er hækkaður til tvær fullar hæddir. Klædningurin er skiftur við rundaði brettir, ið liggja vatnrætt, og flagtakið er burtur.

Um húsini skulu varðveita nakað av síni søguligu tygn, vil eg mæla til, at kommunan fer undir skifta klædningin, lække útbygningin vestureftir til upprunaskap og leggur flagtak aftur á húsið.

Somuleiðis verður mælt til skifta vindeygu og hurðar til gamalt snið, og taka burtur lítla durin, ið er komin aftrat á norðursíðuni, umframt kvistin á eystursíðuni.



*Norðursíðan og vøllgarðurin*

Hvør upprunaliturin var á húsunum kann bert gerast eitt git, men um ein hyggur at myndum, sum geodetarnir tóku í Føroyum, so kundi okkurt bent á, at húsið var svart við hvítum vindeygum til 1898, tá Hans Georg Thomsen og familjan fluttu í nýggja sethúsið, nevnd "Borgen". Hesi hús vóru málaði reyð, og er tað mín meting, at um somu tíð verður Faktorhúsið reytt á liti. Soleiðis, sum flest øll minnast tað altíð at hava verið.

## VIRKSEMIÐ

Tá ein fer undir at hugleiða um, hvat Faktorhúsið og trøðin kann nýtast til, so er lætta loysnin ivaleyst at hugsa, at húsið skal vera eitthvørt slag av savni, tí talan er um elsta hús í býnum.

Eg meti tó ikki, at hetta er tað, ið hevði gagnað býnum best.

Tvøroyri hevur fleiri søvn, eitt virkið handilslív, møguleikar eru fyri at menna eitt spennandi kafé- og matstovuumhvørvi, eins og nógvir útferðarmøguleikar eru til ferðafólk. Vaksandi ferðavinnan merkist, og so hvørt sum aðrar oyggjar fyllast, fer henda vinna eisini at leggja trýst á í Suðuroynni, og harvið krevja betri kunning og tænastur.

Tí haldi eg, at tað sum vantar er ein sjónlig kunningarstova við víðkaðum upplatingar-tíðum, sum kann miðla og samskipa virkesemið í býnum til frama fyri bæði fastbúgvandi og gestir, og umframt eitt útiøki við spæliplássi, har vaksin og børn kunnu uppihalda sær.

Tí er mítt uppskot hetta:

### Faktorhúsið

Húsið verður innrættað til kunningarstovu og borgararhús, og skal sostatt virka kunnandi og ráðgevandi fyri vitjandi og borgarum í kommununi.

Tvs. at í Faktorhúsinum skal bera til at fáa kunning um alt, sum hendir og sum er vitjunarvert í Tvøroyrar kommunu. T.d. kunning um útferðir, matstøð, gistingarmøguleikar, søvn, framførslur, handilslív v.m.

Somuleiðis skal Faktorhúsið kunna borgararnar um kommunal viðurskifti so sum býráðsfundir, broytingar í byggi- og býarplani, valllistar og Ung í Arbeiði. Og húsið skal veita borgarum og tilflytarum vegleiðing um kommunalar tænastur, umsóknarbløð og annars heilt vanliga gerandiskunning um, hvussu borgarin skal bera seg at, ella hvønn myndugleika hann skal venda sær til í ávísum málum.

Í faktorhúsinum eigur at vera atgongd til teldur og alnótina, og um pláss er tøkt, eigur at vera gjørt lítið fundarhøli við samskiftisútgerð, sum borgarar, felagsskapir ella vinnulívið kann leiga til sítt virksemi. Hetta kundi t.d. verið gjørt uppi á loftinum.

#### *Innrætting*

Hvussu húsið frægast verður innrættað til hetta endamál, eigur arkitektur at koma við uppskoti um, men eg ímyndi mær tó, at inngongdin verður í vestara enda oman móti vegnum. Gjørdur verður móttøkudiskur og aðrir hentleikar til viðskiftafólk. Um vestari endi av húsinum verður lækkaður til uppruna skap, eigur av vera umhugsað at lata henda partin av húsinum vera opnan upp í tróðrið. Hæddirnar eru lágar og hevði hetta gjørt, at hølini kendust rúmligari.

Á sama hátt haldi eg, at tað eigur at verða umhugsað at lata part av restini av húsinum verða opnan upp í tróðrið. Hetta til tess at niðara hæddin kennist rúmlig. Alternativt kundi gólvið í erva partvíst verið gjørt úr glasi. T.d. úti undir væðingini.

Innrættingin og val av tilfari eigur í mest møguligan mun at virða søguna hjá húsinum, og í tann mun tað ber til, eiga húsið at hava ein søguliga dám. Tað kundi t.d. verið gjørt við at miðla søguna hjá húsinum við myndum, avrit av viðkomandi skjølum og frásagnum um fólkini, ið hava búleikast í Faktorhúsinum. Hóast alt búðu fyrstu tvørafólk í hesum húsi.




*Sum á myndini kundi inngongdin verið oman móti vegnum*

## Trøðin

Faktortrøðin haldi eg eigur at verða gjørd til eitt grønt uppihaldsøki, sum tó ikki alt eigur at fyllast við trøum og runnum, so søguligi týdningurin hjá trønni verður burtur.

Seyðahúsið eigur at verða tikin niður, og í staðin vil eg mæla til at miðskeiðis á trønni verður gjørt eitt spæliplass, har foreldur eisini kunnu sita við borð, og har til ber at grilla.

Garðin kring trønna kundi kommunan sett ljós á, og ein gøta kundi verið gjørd niðan ímillum Glasstovuna og Fakturhúsið, sum bleiv knýtt í Valin t.d. uppi við Fylking. Ella soleiðis sum tað nú hóskar seg best at gera gøtur gjøgnum trønna.

Annar møguleiki, ið er verdur at umhugsað, er, hvørt tað ber til at gera eitt slag av uttandurapalli á Faktortrønni, har undirhald og tónleikur kundi verið framførdur á t.d. mentanarnátt og jóansøku. Kanska eitt lítið amfieteatur, ið fellur náttúrligt inn í hallið á trønni.

## NIÐURSTØÐA

Stutt sagt er mítt hugskot, at Tvøroyrar kommuna roynir at endurskapa upprunaligu útsjóndina á húsunum uttan, meðan húsið innan fær eina nýmótast kunningarfunktión til gestir og borgarar.

Saman við einum grønum uppihaldsøki og spæliplássið á trønni, kundi hesin fyrsti bústaður á Tvøroyri soleiðis blivið eitt savnandi stað fyri býin.

/Rókur Tummasarson



*Kunning til gestir og borgarar*